Kunning um FV-skipanina

ALS

Kunning um FV-skipanina

Innihaldsyvirlit **Síða**

Um FV-skipanina	2
Treytir	3
FV-stuðulin	5
FV-kortið	7
Soleiðis fyllir tú FV-kortið út	8

Um FV-skipanina

Fiskavirkisskipanin er hugtak fyri ta skipan, sum fevnir um rættindi og skyldur fyri tey fiskavirki og teir persónar, ið koma undir treytirnar í Kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli til arbeiðsleys á fiskavirkjum.

Arbeiðsleys/ur á fiskavirki
Hevur tú setanarligt tilknýti til eitt fiskavirki, sum er í fiskavirkisskipanini hjá ALS, kanst tú søkja um arbeiðsloysis-stuðul sum arbeiðsleys/ur á fiskavirki. Hetta gert tú við at fylla út eina umsókn, sum tú fært frá fiskavirkinum, og har virkið váttar setanarliga tilknýtið. Setanarliga tilknýtið skal skjalfestast við avriti av setanarprógvnum, sum skal sendast ALS saman við umsóknini.

Treytir

Fyri at fáa arbeiðsloysisstuðul útgoldnan um fiskavirkisskipanina skalt tú vera arbeiðsleys/ur á fiskavirkinum, og vil tað siga, at tú verður send/ur heim vegna tíðarbundnan steðg.

Tú verður ikki at meta sum arbeiðsleys/ur á fiskavirki, um tú:

- ert í útbúgving í vanligu arbeiðstíðini
- ert sjálvstøðug/ur vinnurekandi
- hevur setanarligt tilknýti til aðrar arbeiðsgevarar meira enn 10 tímar um vikuna
- hevur arbeitt meira enn 10 tímar um vikuna hjá øðrum arbeiðsgevarum, 8 vikur á rað
- ikki hevur havt arbeiði á fiskavirkinum 8 vikur á rað
- fært vanligan arbeiðsloysisstuðul
- ert stjóri ella nevndarformaður í partafelag ella líknandi

Tíðarbundin steðgur

Tíðarbundin steðgur er at skilja sum steðgur vegna tørvandi feska rávøru ella aðrar tílíkar umstøður. Verður tú send/ur heim av øðrum orsøkum enn tørvandi feskari rávøru ella tílíkum, sum í mesta lagi varir tvær vikur, lýkur tú somuleiðis treytirnar um at fáa arbeiðsloysisstuðul um fiskavirkisskipanina. Varir steðgurin longri enn 2 vikur, fært tú ikki arbeiðsloysisstuðul longur eftir fiskavirkisskipanini.

Í sambandi við at tú fært útgoldið arbeiðsloysisstuðul, hevur tú skyldu til at vera tøk/ur sambært galdandi reglum. Tað merkir m.a. at tú er til reiðar at taka av øllum arbeiði, sum arbeiðsávísingin hevur til tín, og sum tú hevur fakligan førleika til, tvs.

Treytir

arbeiðsgevari metir teg hava førleika til, seinast dagin eftir at eitt arbeiði verður ávíst tær.

Í hesum sambandi eru allar Føroyar at rokna sum ein arbeiðsmarknaður, tvs. at tú mást vera til reiðar at átaka tær arbeiði allastaðni í Føroyum. Seinast dagin eftir at eitt arbeiði verður ávíst, skalt tú kunna byrja hetta arbeiðið.

Um tú noktar at taka av arbeiðstilboði uttan serliga orsøk, missir tú rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur. Eru heilsuligar orsøkir, sum gera, at tú ikki kanst átaka tær eitt og hvørt arbeiði, skal læknaváttan vera til skjals.

FV-stuðulin

Útrokningargrundarlagið
Arbeiðsloysisstuðulin verður roknaður út eftir lønarinntøkuni seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn tú fyrstu ferð hevur rætt til útgjald eftir fiskavirkisskipanini. Hetta verður nevnt útrokningargrundarlagið.

Arbeiðsloysisstuðulin er 75% av útrokningargrundarlagnum, og er mesti tímasatsurin pr. d.d. 103,75 kr. Útrokningargrundarlagið verður roknað av nýggjum tann 1. januar á hvørjum ári. Nýggja útrokningargrundarlagið kann tó ongantíð verða lægri enn tað fyrsta útrokningargrundarlagið.

Kemur tú harafturímóti aftur í fiskavirkisskipanina eftir at hava verið útmeldað/ur úr skipanini, kann tað hava ávirkan á útgjaldið. Hetta hendir, tí at útgjaldið altíð verður roknað út eftir inntøkuni seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn tú fyrstu ferð hevur rætt til útgjald eftir fiskavirkisskipanini. Er tað minni enn 1 ár síðani tú seinast fekk útgjald frá ALS, tað veri seg eftir fiskavirkisskipanini ella vanligu skipanini, verður seinast nýtta útrokningargrundarlag nýtt, um so er, at tað er hægri enn tað nýggja.

FV-dagar (tíðarskeið)
Árið er býtt sundur í útgjaldsskeið, og fyri hvørt skeið, tú hevur rætt til útgjald, skalt tú lata inn eitt FV-kort. Í hvørjum útgjaldsskeiði eru 14 álmanakkadagar og í mesta lagi 8 útgjaldsdagar, 4 í hvørjari viku.

Stuðulin verður roknaður hvørja viku sær
Sjálvt um útgjaldsskeiðini fevna um tvær vikur, verður stuðulin

FV-stuðulin

roknaður fyri hvørja viku sær. Arbeiðsleys á fiskavirkjum fáa arbeiðsloysisstuðul roknaðan eina ferð um vikuna, frá og við 9. arbeiðsloysistíma. Hetta hevur við sær, at tað í mesta lagi ber til at fáa arbeiðsloysisstuðul í 32 tímar, svarandi til 4 dagar um vikuna. Hevur tú avtalu við fiskavirkið um at arbeiða niðursetta tíð, ella tú arbeiðir á einum fiskavirki, sum ikki er fevnt av fiskavirkisskipanini fulla tíð, fært tú arbeiðsloysisstuðul samsvarandi hesum.

Inntøka oman fyri eina vanliga vikuløn verður umroknað
Arbeiðir tú so mikið hjá fiskavirkinum og/ella øðrum arbeiðsgevara, at A-inntøkan er oman fyri eina vanliga vikuløn*, verður tann parturin, sum er oman fyri vikuløninа, umroknaður til tímar, ið skerja arbeiðsloysisstuðulin.

**Í ALS høpi er ein vanlig vikuløn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag (FA) og Føroya Arbeiðsgevarafelag (FAG)*

Mest loyvda dagatal
Arbeiðsloysisstuðul kann í mesta lagi verða útgoldin í 648 dagar í einum 4 ára skeiði. Eftir hetta steðgar útgjaldið, og tú hevur ikki rætt til arbeiðsloysisstuðul næstu 24 mánaðirnar. Eftir at teir 24 mánaðirnir eru farnir, kanst tú koma inn aftur í skipanina - eftir somu treytum, sum tey, ið søkja um arbeiðsloysisstuðul fyrstu ferð.

Nær fái eg útgjald?
Vanliga verður stuðulin útgoldin annanhvønn fríggjadag. Útgjaldið verður flutt á kontu í peningastovnunum.

FV-kortið

Um FV-kortið
Við FV-kortinum boðar tú frá:
- at tú ert tøk/ur fyri ávísa fiskavirkið
- lønarinntøku íroknað frítíðarløn - fundarpeningi og samsýningum
- nær tú heldur frí/fert í feriu (gev gætur! Ikki rætt til arbeiðsloysisstuðul)
- broytingum og viðurskiftum annars, sum kunnu ávirka útgjaldið
- um tú ert givin at arbeiða á fiskavirkinum
- um tú fert í skúla - um tú ert sjúkrameldað/ur
- um tú ert farin í barnsburðarfarloyvi

Soleiðis fyllir tú FV-kortið út

Her verður greitt nærri frá, hvussu tú fyllir FV-kortið út.

Á forprentaða FV-kortinum eru teigarnir á forsíðuni útfyltir. Tá setir tú kross í teig 1a, 1b og 2 og fyllir út baksíðuna, um tað krevst. Er FV-kortið ikki forprentað, fyllir tú sjálv/ur teigarnar á forsíðuni út

Teig 1 a - havt tilknýti til fiskavirkið...
Tú setur kross við ja, um tú hevur havt tilknýti til fiskavirkið alt tíðarskeiðið, FV-kortið fevnir um. Hevur tú ikki havt tilknýti til virkið í tíðarskeiðnum, setur tú kross við nei. Hevur tilknýtið bert verið partvíst, setur tú kross við partvíst og útgreinir hetta á baksíðuni undir "Onnur fráboðan".

Teig 1 b - verið tøk/ur til arbeiði fyri fiskavirkið...
Tú setir kross við ja, um tú hevur verið tøk/ur fyri fiskavirkið alt tíðarskeiðið, FV-kortið fevnir um. Hevur tú ikki verið tøk/ur fyri fiskavirkið í tíðarskeiðnum, setur tú kross við nei. Hevur tú bert verið partvíst tøk/ur fyri virkið, setur tú kross við partvíst og útgreinir hetta á baksíðuni undir "Onnur fráboðan".

Navn, bústaður, býur/bygd
Her skrivar tú navn, bústað og bý/bygd

Í øllum tíðarskeiðnum
Her skrivar tú dagfestingina fyri útgjaldsskeiðið. Dømi: 12092016 – 25092016

Soleiðis fyllir tú FV-kortið út

Føðingardagur
Her skrivar tú føðingardagin hjá tær.

Skeið
Her skrivar tú nummarið á útgjaldsskeiðnum. Numrini finnur tú á ALS-kalendaranum.

Fráboðan um annað arbeiði
Tá tú boðar frá, at tú hevur arbeitt hjá øðrum arbeiðsgevarum enn fiskavirkinum, tú ert knýtt/ur at, skulu vikurnar tilskilast hvør sær. Skriva hvussu nógvar tímar tú hevur arbeitt og inntøkuna í heilum krónum - íroknað frítíðarløn.
Arbeiði uttan fyri vanliga arbeiðstíð, vikuskifti og halgidagar, skal eisini skrivast á FV-kortið.

Onnur fráboðan
Her sigur tú frá:
- frá hvørjum degi, tú ert tøk/ur hjá fiskavirkinum
- tíðarskeiðnum, tú heldur frí/feriu - minst til, at frítíðin skal fráboðast í góðari tíð
- frá hvørjum degi, tú ikki ert tøk/ur hjá fiskavirkinum meira
- um tú fert í skúla
- um tú ert sjúkrameldað/ur
- um tú fert í barnsburðarfarloyvi

Fundarpeningur/aðrar samsýningar
Her boðar tú frá fundarpeningi og øðrum samsýningum

Soleiðis fyllir tú FV-kortið út

Er talan um fund, skalt tú í teigin "dagf./tíðarsk." skriva, nær fundurin hevur verið og í teiginum "tímar", hvussu leingi hann hevur vart. Er talan um samsýning, pensjón ella annað, sum tú fært fyri eitt tíðarskeið, skal tíðarskeiðið skrivast í henda teig.

Í upplýstu inntøkuni skal frítíðarløn vera íroknað.

Í teiginum "Frá hvørjum" skalt tú skriva hvør, ið hevur goldið tær fundarpeningin ella samsýningina.

Hvør skal lata FV-kortið inn?
Øll, sum hava rætt til stuðul sambært fiskavirkisskipanini, skulu lata inn FV-kort. Tó er bert neyðugt at lata FV-kortið inn tey skeið, tá ið tú hevur rætt til útgjald frá ALS.

Tín fráboðan
FV-kortið er ein fráboðan til ALS um støðu tína sum arbeiðsleys/ur á fiskavirkinum seinasta útgjaldsskeiðið, t.e. seinastu 14 dagarnar. Við FV-kortinum boðar tú frá, hvørji tíðarskeið tú ert arbeiðsleys/ur á fiskavirkinum, og um tú ert tøk/ur fyri fiskavirkið í útgjaldsskeiðnum ella bert part av tíðarskeiðnum. Tú sigur somuleiðis frá øðrum arbeiði, sjúku, frítíð o.ø. FV-kortið er við til at tryggja, at rætta upphæddin verður útgoldin.

Hvar og nær skal FV-kortið latast inn?
FV-kortið skal latast inn á fiskavirkinum ella ALS teir dagar, sum eru ásettir av ALS. Vanliga eru FV-dagarnir mánadag til fríggjadag í vikuni, eftir at skeiðið er lokið.

Soleiðis fyllir tú FV-kortið út

Soleiðis fært tú FV-kortið
FV-kort eru at fáa á fiskavirkinum.

Tú og fiskavirkið vátta
Tað er bert tú sjálv/ur, sum hevur loyvi at fylla út og undirskriva FV-kortið, og kanst lata kortið inn á virkið. Fiskavirkið váttar somuleiðis, at tær upplýsingar, tey hava givið á FV-kortið, eru sannar.

Tú váttar, at allar upplýsingarnar á kortinum eru rættar, bæði tær, sum virkið hevur givið, og tær, sum tú sjálv/ur hevur givið. Eisini váttar tú, at upplýsingar frá møguligum øðrum arbeiðsgevarum eru rættar.

Lat FV-kortið inn rættstundis!
Tað er sera umráðandi, at FV-kortið verður latið inn teir dagar, sum ALS hevur ásett, hvørki fyrr ella seinni. Verður kortið t.d. latið inn ein dag ov tíðliga ella tveir dagar ov seint, so missir tú stuðulin í ávikavist ein og tveir dagar. So tað ræður um at lata FV-kortið inn rættstundis. Dagarnir, tá ið FV-kortið skal latast inn, verða nevndir FV-dagar; dagarnir síggjast á ALS-kalendaranum.

Letur tú FV-kortið inn ov tíðliga, verður útgjaldið fyri tað tal av døgum, tú ert ov tíðliga, drigið frá útgjaldinum.

Letur tú FV-kortið inn ov seint, verður útgjaldið fyri sama tal av døgum drigið frá útgjaldinum, FV-kortið fevnir um.

Soleiðis fyllir tú FV-kortið út

Kvittanin er tín trygd
Tá ið tú letur FV-kortið inn á fiskavirkinum ella ALS, verður kortið móttøkustemplað, og tú fært eina kvittan. Kvittanin er eisini móttøkustemplað, og hon er tín trygd fyri, at tú hevur latið kortið inn rættstundis. Tað ávirkar ikki útgjaldið, um fiskavirkið letur ALS FV-kortini ov seint. Í ringasta lagi førir hetta við sær, at útgjaldið verður seinkað.

Alt skal vera í lagi
Er FV-kortið ikki rætt útfylt ella vanta upplýsingar, fært tú kortið aftur. Stuðul verður ikki útgoldin, fyrr enn alt er í lagi. Fært tú stuðul, sum tú veitst, at tú ikki hevur rætt til, hevur tú skyldu at boða ALS frá hesum beinanvegin.

Tað er álvarsamt at geva skeivar upplýsingar ella at tiga um umstøður, sum kunnu hava týdning fyri útgjaldið. Hetta ber í sær, at upphæddir, sum eru útgoldnar av órøttum, verða kravdar afturgoldnar, og tú kanst verða revsað/ur við sekt ella hefti. ALS kann útvega upplýsingar frá myndugleikum, arbeiðsgevarum og fakfeløgum til tess at tryggja sær, at rætt verður útgoldið.

Tilknýtið hildið uppat
Um tú ikki longur ert knýtt/ur at fiskavirkinum, og tú gerst arbeiðsleys/ur, er umráðandi, at tú boðar ALS frá sum skjótast. Ein møgulig umsókn um arbeiðsloysisstuðul eftir vanligu skipanini fær gildi frá tí degi, hon er ALS í hendi.